# Striptease einaferð enn í Løgtinginum

**Jenis av Rana sigur, at tað er umráðandi at halda lív í orðaskiftinum um striptease og annað virksemi av hesum slagi í Føroyum tí hann væntar, at fyrr enn seinni fer tað at geva úrslit**

STRIPTEASE
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ólavsøkan nærkast. Og líka vist sum midnáttarsangur er vorðin ein fastur táttur á Ólavsøki hesi seinastu árini, líka vist er tað, at eisini Striptease er vorðin ein fastur táttur av undirhaldinum á tjóðarhátíð okkara.

Og líka vist er tað eisini, at Jenis av Rana, løgtingsmaður, fer at tala at, tí tað hevur hann gjørt í fleiri ár á rað.

Hann hevur enntá málið í Løgtinginum fyri at vita, hvat landsins myndugleikar ætla at gera við hesi viðurskifti.

Og tað fer hann aftur at gera nú.

Í Ólavsøkublaðnum hjá Sosialinum, sum kom fyrr í vikuni, er stór lýsing, har lýst verður við Striptease í Eclipse í miðbýnum í Havn.

Og hetta ætlar Jenis av Rana sær at reisa í løgtinginum í heyst, nú tað nýggja tingárið byrjar á Ólavsøku.

– Eg fari at seta landsstýrismanninum í lógarmálum ein fyrispurning fyri at vita, um ætlanin er at gera nakað við hesi viðurskifti, sigur Jenis av Rana.

Hann ásannar, at hetta er eitt mál, sum hann hevur reist fleiri ferðir áður, bæði í Løgtingi og í almenna kjakinum.

Men hann ætlar sær ikki at gevast.

– Eg haldi, at tað er av størsta týdningi, at vit ikki gloyma hesi viðurskiftini, men taka tey fram við jøvnum millum bili fyri at halda lív í kjakinum.



*Jenis av Rana ætlar ikki at gevast og tí fer hann enn einaferð at reisa spurningin um Striptease í løgtinginu m*

Hann er sannførdur um, at verður lív hildið í kjakinum, fer tað at hjálpa fyrr ella seinni.

–Hetta er málið um almenna tíðindamonopolið eitt sera gott dømi um. Tað varð felt ferð eftirferð. Hetta eru mál, sum varð reist aftur og aftur og at enda bar tað frukt og almenna tíðindamonopolið varð brotið.

## Fáa onki gjørt

Jenis av Rana væntar eisini, at stríðið ímóti Striptease og øðrum virksemi av hesum slagi, fer eisini at geva úrslit einaferð.

– Hvørja ferð, vit hava reist málið, fáa vit at vita, at føroyskir myndugleikar fáa onki gjørt, tí tað er fútin, sum er danskur, ið umsitur lógina.

Samstundis hevur viðgerðin í Løgtinginum víst, at politiska skipanin er samd um at slíkt virksemi hoyrir ikki heima í Føroyum.

– Tað er vanæriligt, at vit ikki kunnu stýra slíkum viðurskifti í okkara egna landi. Tað er eisini vanærilig skomm, at politiska skipanin í Føroyum skal hava eina meining um hesi viðurskifti uttan at fáa gjørt nakað sum helst, tí vit onga avirkan hava á støðuna, men heldur lata útlendskar fyrimyndir leggja støðið fyri slíkum virksemi.

– Striptease og líknandi virksemi er beinleiðis ágangur ímóti kvinnum, tí mangan er tað ikki sjálvboði, at kvinnur eru uppí í slíkum virksemi, og tað eiga vit ikki at lata um okkum ganga, sigur løgtingsmaðurin.

Tí ætlar hann at spyrja landsstýrismannin í lógarmálum, Jógvan við Keldu, um nakrar ætlanir eru at broyta viðurskiftini ella um ætlanin er bara at lata standa til.

– Lata vit standa til, er hetta tað sama sum at sleppa veikum kvinnum, upp á fjall.

## Minst fýra milliónir um árið

Jenis av Rana leggur afturat, at hvørt ár verða fleiri milliónir, flest teirra kvinnur og børn, seld ímillum heimsins lond í sambandi við skøkjulevna.

Í Svøríki er skøkjulevnaður mettur sum harðskapur ímóti kvinnum og er bannaður við lóg.

Hann vísir á, at bæði í Danmark og Íslandi, hevur skøkjulevnaður vundið nógv upp á seg seinastu árini og í báðum hesum londum verður staðfest, at tað byrjaði við at loyva striptease.

Hann vísti eisini á, at ein fyrilestrarhaldari í Norðurlandahúsinum á fundinum hjá Kvinnufelagnum og Kreppumiðstøðini um skøkjulevnað vísti á hetta sama og ráddi føroyingum til at steðga slíkum virksemi.

SEV

**Elverkfrøðingur ella tilsvarandi søkist til veikstreyms- og eltøkniøkið hjá SEV**

**Kanst tú lofta við fleiri bóltum samstundis?**
**Kanst tú geva títt íkast til okkara stýringsteknisku konstruktiónir?**
**Kanst tú arbeiða undir trýsti og hava yvirarbeiði í avmarkaða tíð í senn?**
**So ert tú tann, vit sóknast eftir.**

Ein elverkfrøðingur ella umsøkjari við aðrari tilsvarandi útbúgving, og við stórum áhuga innan stýringar, hevur møguleikan at fáa eitt spennandi og til tíðir krevjandi arbeiði í einum felagi í stórari menning innan eltekniska økið.

Tú verður partur av einum toymi, sum hevur ábyrgd av eltekniska útbúnaðinum á elverkum og koblingsstøðum kring landið.

Tú má hava góð samstarvsevnir og kunna málbera teg bæði í skrift og talu á føroyskum, donskum og enskum.

**Tínar uppgávur umfata m.a.**
· Projektering, menning, dokumentering, test og viðlíkahald av stýringum.
· Programmering og seta í verk PLC , HMI og fjarstýringstøkni.
· Projektering av lágspenningstalvum.

**Sum umsøkjari til starvið hevur tú fyrimun, um tú:**
· Hevur royndir innan eitt ella fleiri av hesum økjum: Automatión, HMI, elprojektering, eldokumentatión, instrumentering og mátiteknikk.
· Hevur eina handverksliga grundútbúgving innan el.
· Hevur evnir og áræði at arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunnu bjóða tær:**
· Eitt sera fjølbroytt arbeiði, har tú hevur møguleika at vera við frá menning til íverksetan.
· Eitt arbeiði, sum tú sjálvur er við til at tilrættaleggja.
· Møguleika fyri persónligari og fakligari menning.
· Eitt gott arbeiðsumhvørvi, har samstarv og smidleiki verður hámett.

**Lønin:**
Sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Verkfrøðingafelag.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Klæmint Weihe, stjóra ella Terja Nielsen, deildarverkfrøðing á telefon 346800.

Umsóknir skulu saman við avritum av prógvum og møguligum ummælum sendast Elfelagnum SEV, postrúm 319, FO-110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi **mikudagin, 17. august 2005**.

**Elfelagið SEV:**
*Felagið, tú fer at arbeiða hjá, er interkommunala Elfelagið SEV, sum tekur sær av at streymveita allar Føroyar frá og við elframleiðsluni og til endaliga brúkaran. SEV hevur uml. 150 fólk í starvi og á deildini, har tú fer at arbeiða, eru frammanundan 2 verkfrøðingar og 3 montørar.*

Sosalurin 341800